Álit

í

løgtingsmáli nr. 10/2026: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Persónar, sum hava fingið tillutað framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 26. august 2026, og eftir 1. viðgerð 28. august 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4. september 2026.

Uppskotið snýr seg um at broyta eftirlønarlógina soleiðis, at tey, sum hava eina eftirlønaruppsparing og hava fingið tillutað framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu fáa útgjald av síni eginuppsparing, áðrenn tey hava rokkið fólkapensjónsaldur. Skipanin verður sjálvboðin, so móttakarin kann sjálvur velja, um hann ynskir hetta ella ikki.

Av tí at eitt uppskot við sama endamáli (tingmál nr. 078/2025) var til viðgerðar í februar í ár, men fall burtur, tá val varð útskrivað, valdi Fíggjarnevndin ikki at hava nýggjar innkallingar í sambandi við hetta uppskotið. Fleiri innkallingar vóru, tá fyrra uppskotið varð viðgjørt, og hesar vístu, at breið undirtøka var fyri uppskotinum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 10. september 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	